# KT ráðgeving til forkanning av talgildum koyrikorti til føroyingar

## 1. Inngangur

Sum fyrireiking til eina møguliga íverksetan av einum føroyskum talgildum koyrikorti, hevur Akstovan, í samstarvi við Talgildu Føroyar, sett í verk eina forkanning hesum viðvíkjandi. Talgildu Føroyar stendur fyri forkanningini og tí eisini fyri hesum útboðnum.

Partur av forkanningini snýr seg um at gera uppskot til loysnir, á konsept stigi, sum skulu verða grundarlag fyri stigtøkuni um menning. Uppskotini skulu gerast á trimum ymiskum ambitiónsløgum, einfalt, miðal og ambitiøst.

Í hesum sambandi verður leitað eftir einum KT ráðgeva, ið skal standa fyri tøkniligu veitingunum í forkanningini. KT ráðgevin verður partur av verkætlanarbólkinum og luttekur á fundum og verkstovum. Nakrar av týðandi uppgávunum hjá KT veitaranum eru at lýsa yvirskipaði krøv, gera uppskot til loysnir og gera kostnaðar- og tíðarmetingar fyri menningina av loysnunum.

## 2. Bakgrund

Fleiri av londunum rundanum okkum hava longu ment og íverksett talgild koyrikort. Eftir øllum at døma fara alsamt fleiri lond at talgilda koyrikort í framtíðini, og er hetta eisini í tráð við rákið, ið sæst innan samfelagsliga talgilding á øðrum økjum. Akstovan metir, at tíðin er búgvin at seta í verk eina líknandi tilgongd í Føroyum.

**Endamál við forkanningini**
Endamálið er at skapa eitt avgerðargrundarlag fyri einum talgildum koyrikorti til føroyingar. Tað er m.a. at greina og skjóta upp møguligar loysnir og at veita neyðugu upplýsingarnar soleiðis, at tað verður léttari at taka avgerð um eina framtíðarloysn. Forkanningin skal samstundis verða fyrireiking til eina møguliga menningarverkætlan og kunna brúkast sum tilfar til eitt møguligt útboð, soleiðis at íverksetanin gerst léttari.

## 3. Uppgávan hjá KT ráðgevanum

Høvuðsuppgávan hjá KT ráðgevanum er at lýsa og gera uppskot til tríggjar loysnir um talgild koyrikort á ymiskum ambitiónsløgum.

**Talan er um hesar partsuppgávur:**

- Luttaka á fundum við koyrikortsmyndugleikar úr øðrum londum.
- Gera tørvslýsing á yvirskipaðum stigi.
- Gera tekniska lýsing av trimum møguligum loysnum. Har ímillum skal fylgjandi lýsast:
    - Arkitekturur
    - Integratiónir
    - Trygd
- Skjalfesta og ritstjórna tørvslýsing og uppskot til loysnir, og góðskutryggja skrivliga tilfarið.

- Meta um vavið á menningaruppgávuni, gera kostnaðar- og tíðarmetingar fyri tær ymisku loysnirnar.

### 3.1 Verkætlanarbygnaður:

KT ráðgevin kemur at verða partur av einum verkætlanarbygnaði, sum lýstur er niðanfyri.




### 3.2 Yvirskipað tíðarætlan

Niðanfyri sæst ein yvirskipað tíðarætlan fyri forkanningina.




Sí viðfestu verkætlanarlýsing fyri nærri lýsing av forkanningini.

## 4. Tímatal

Tímataliđ er mett til millum 160 og 220 tímar í virknari arbeiđstíđ í tíđarskeiđinum fram til 31. november 2021. Ráđgevin skal veita neyđugu veitingarnar til ásettu tíđina og luttaka til ásettu fundirnar, men ræđur annars sjálvur fyri, hvussu tímarnir verđa býttir sundur.

Útgreinađur sáttmáli, iđ lýsir umstøđurnar frá forkanningini, verđur gjørdur viđ tann, sum vinnur útbođiđ.

## 5. Fyritreytir/Krøv:

- Tađ er ein fortreyt, at uppskot til loysnirnar í mest møguligan mun byggja á undirstøđukerviđ hjá Talgildu Føroyum.
- Úrslitiđ av forkanningini skal kunna brúkast til eitt møguligt útbođ til framhaldandi menning.
- Loysnirnar skulu lúka altjóđa lógar- og trygdarkrøv.

## 6. Krøv og ynskir til KT ráđgeva:

- Tađ er eitt krav, at ráđgevin er nevndur persónur. Um talan er um fyritøku, iđ velur at bjóđa, so skal vera viđmerkt, hvør persónurin er, iđ skal standa fyri uppgávuni.
- Ráđgevin skal byrja skjótast til ber og annars í samráđ viđ verkætlanarleiđaran. Lagt verđur upp fyri summarfrí.
- Ráđgevin megnar at miđla og skjalfesta torgreitt tilfar á ein hátt, iđ er lættur at skilja.
- Ráđgevin hevur royndir viđ líknandi KT verkætlanum seinastu árini.
- Ráđgevin skal duga at gera greiningararbeiđi.
- Ráđgevin hevur royndir innan KT arkitektur, menning av skipanum og appum.
- Tađ er ein fyrimunur, um ráđgevin eisini hevur innlit í loysnirnar hjá Talgildu Føroyum.

## 7. Krøv til tilbođ

Í tilbođnum skal vera upplýst:

- Navn og CV hjá ráđgeva, iđ hevur høvuđsábyrgd av uppgávuni.
- Navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku.
- Prísur pr. tíma uttan MVG.

- Frágreiðing, um hvussu krøv og ynski til ráðgevan, nevnd omanfyri, verða lokin. Um talan er um fyritøku, ið ynskir at gagnnýta fleiri persónar, so skal greiðast frá, hvørjir persónar luttaka í forkanningini, og hvørjar førleikar hesir hava.
- Frágreiðing um aðrar viðkomandi útbúgvingar, vitan og royndir.
- Hvørjar viðkomandi kundar ráðgevin hevur havt, og hvørjar viðkomandi uppgávur ráðgevin hevur loyst.

## 8. Tíðarfreistir og ábyrgd

Tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin: jenspetur@talgildu.fo, innan fríggjadagin tann 21. juni 2021, kl. 12:00. Miðað verður eftir at hava sáttmála undirskrivaðan 25. juni 2021.

Eru spurningar um útboðstilfarið og uppgávuna, so ber til at venda sær til Jens Petur Andreasen á tel. 792 427 ella umvegis teldupostin: jenspetur@talgildu.fo. Allir spurningar skulu sendast inn skrivliga innan mikudagin 16. juni 2021. Allir spurningar verða kunngjørdir dulnevndir á Keypsportalinum.

### 8.1 Tíðarætlan fyri útboð og innlating

| Dagfesting | Hending | Viðmerking |
|---|---|---|
| Mik. 9. juni | Tilfar lagt á Keypsportalin. | Spurningar skulu verða skrivligir og sendast til Talgildu Føroyar, jenspetur@talgildu.fo, viðmerkt: Spurningur um útboð til forkanning um talgild koyrikort.<br><br>Spurningar verða dulnevndir og lagdir á Keypsportalin. |
| Mik. 16. juni | Freist hjá veitarum at seta spurningar um útboðstilfar. | |
| Hós. 17. juni | Skjal við øllum spurningum og svarum verður lagt á Keypsportalin. | |
| **Mán. 21. juni, kl. 12:00** | **Freist at lata inn tilboð.** | Tilboðið skal latast inn umvegis teldupost til jenspetur@talgildu.fo, viðmerkt: Tilboð viðvíkjandi forkanning um talgild koyrikort.<br><br>Gevið gætur: Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd. |
| 21. - 25. juni | Tilboðini verða viðgjørd og vinnarin funnin. Samráðingar um sáttmála. | Talgildu Føroyar tilskilar sær rætt at venda sær til tilboðsgevararnar við útgreinandi spurningum um tilboðini. |
| Frí. 25. juni | Vinnandi tilboð verður kunngjørt. | |

## 9. Vekting og val av ráðgeva

Talgildu Føroyar tilskilar sær rætt, í samráð við ráðgevan, at venda sær til aðrar kundar hjá ráðgevanum fyri at fáa ummæli.

Um Talgildu Føroyar og vinnarin av útboðnum ikki kunnu semjast um ein sáttmála, so fær næstur í røðini møguleikan at gera sáttmála.

Talgildu Føroyar tilskilar sær rætt at vraka tilboð, um talan er um persón, sum Talgildu Føroyar av einari ella fleiri eintýddum orsøkum ikki kann góðkenna.

Millum innkomnu tilboðini, sum lúka krøvini, verður vektað eftir prísi og førleikum. Prísur telur 50% og førleikar telja 50%.

Øll tilboð fáa stig fyri prís og førleikar, millum 0 og 50 stig hvørt. Tilboðið við lægsta prísinum fær 50 stig, og restin fær so stig í mun til lægsta prís. Um tímaprísurin er lægri enn 600 kr./tíman uttan MVG, verður hann settur til 600 kr. í samanberingini við aðrar.